# Brann inni í bilinum

**Dagurin í gjár var ein vanlukkudagur hjá kvívíkingum, tá teir mistu ein av sínum egnu. Seinnapartin í gjár kom eldur í ein bil við kirkjuna. Ein 76 ára gamal kvívíkingur var í bilinum, og lat lív**



*Tað var her á pareringsøkinum við kirkjuna í Kvívík, at bilurin brendi. Hóast Sløkkiliðið í Kvívík var á staðnum beinanvegin, var einki at gera fyri at bjarga manninum úr bilinum*

112

*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Syrgilig vanlukka var í Kvívík í gjár seinnapartin. Klokkan 15.08 fekk løgreglan eina fráboðan um, at eldur var í einum bili á parkeringsøkinum við Kirkjuna í Kvívík.

Sløkkiliðið í Kvívík var á staðnum beinanvegin, og klokkan 15.20 var eldurin sløktur. Vakthavandi á Politistøðini í Havn sigur, at tá fráboðanin kom, stóð bilurin longu í ljósum loga, og fólk sluppu ikki at bilinum fyri tí nógva hitanum.

Hóast Sløkkiliðið í Kvívík var á staðnum beinanvegin, var einki, teir kundu gera fyri at fáa mannin úr bilinum, og 76 ára gamli kvívíkingurin brann sostatt inni í bilinum.

Løgreglan veit ikki at siga hví eldur kom í bilin, men bilurin er fingin suður til Akstovuna, har bilurin nú kannaður nærri av serkønum fólki, soleiðs at staðfestast kann, hví, hvar og hvussu eldurin er uppstaðin.

Sum tað sæst á myndini, er bilurin næstan ikki brendur frammi í motorrúminum, og er eldurin tí ikki uppstaðin har, sum mest vanligt er at eldur kemur í bilar.

Tey, ið varða av manninum, fingu boðini beinanvegin.

PhotoCare

Stór kapping um:

Føroya fittasta pinkubarnamynd

Ókeypis myndatøka
í Photo Care

Í sambandi við kappingina bjóða vit ókeypis myndatøku av børnum í aldrinum 0-12 mánaðir í Photo Care í Havn og Klaksvík.

Tilboðið er galdandi frá 8. februar til 14. mars 2009.

Myndirnar verða sýndar fram í handlunum frá 1. apríl.

1. mai heldur kappingin fram á heimasíðuni hjá photacare.dk, har vinnarin fer víðari í kappingini.

Frá 1. til 31. mai kunnu øll atkvøða á photocare.dk.

Øll eru vælkomin í handlarnar at atkvøða.

Bíleggið tíð hjá okkum á

Klaksvík...............tel. 45 7272
Tórshavn .............tel. 31 7-9-13



Myndirnar fáast til keyps fyri ein lagaligan prís